# SETHÚSAMARKNAÐURIN

Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 260 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 13 - 16 tel 320252

SetHúsaSølan

NÝTT

**Leynar: Summarhús til sølu**



Matr. nr. 75, grundøki 412 m².
Húsini, ið eru bygd síðst í 70-unum. Tey seinastu árini er umvælingar gjørdar, so sum bjálving og húsini hava fingið miðstøðuhita.
Húsini eru uml. 50 m² í einari hædd við krúpikjallara.
Stovuhæddin hevur gongd, stóra stovu og køk í einum við breiðari harmonikuhurð ímillum,
kamar við 4 seingjarplássum, wc/brúsu, og goymslurúm/hjallur.
Út frá stovuni er stór altan við sera vøkrum útsýni í allar ættir.
Húsini liggja í fremstu røð, beint við hugnalig løkju.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

NÝTT

**Vágur: Sethús til sølu**



Matr.nr. 495a, støddin er 443 m².
Sethús í 3. hæddum, hvør hæddin umleið 102 m²
Stovuhædd: trappa/ gong, køkur,hjallur, spísistova, stova, kamar,hjúnarrúm og baðirúm. Garsja føst í húsinum.
Loftshæddin:stór loftsstova og 4 kømur.
Kjallarahæddin: fýrrúm, vaskikjallari, kamar, wc og stórt kjallararúm.
Húsini eru í góðum standi, út- og umbygd í 1985 og alt gjørt av nýggjum, klædningur, vindeygur og alt innandura, seinni er nógv tilfar keypt sum liggur klárt at seta upp, millum annað nýtt tak.
Girðing er kring húsini við havagarði á sólsíðuni. Gott útsýni frá loftsstovuni út á fjørðin.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

**Fuglafjørður: Sethús til sølu!**



Úti á land, Grønatúgva 60
matr.nr. 781a, grundøki 451 m².
Húsini eru bygd í 1966 í tveimum hæddum, Stovuhæddin 117 m², kjallarahæddin 93 m². Eisini er fín garasja.
Stovuhæddin: gong, køkur, stova, hjúnarrúm, baðirúm, kamar, sjónvarpstova, hjallur. Húsini hava stóra altan oman móti sjónum og frá sjónvarpstovuni er gong niðaneftir, út á stóra terassu.
Kjallarahædd: durur, gong, vaskirúm, trappa upp á stovuhæddina, kjallararúm + ein sjálvstøðug íbúð sum er skildrað soleiðis:køkur/stova, sovirúm, wc.
Garður er rundanum húsini og ein stór terassa frá kjallarahæddini. Húsini eru í góðum standi, stoypt upp, klødd við plastik, alminiumzink tak og plastikvindeygur.
Húsini liggja væl fyri og hava gott útsýni í allar ættir.
**Verða seld,um nøktandi boð verður givið**

**Argir: Jørð til sølu**



Millum Reynstún og dagstovnin.
Umleið 5140m².
Matr.nr.4cl,2506 m² – 4bs, 1340 m² og 4cm, 1294 m².
Jarðarstykkið liggur sera væl fyri við góðum útsýni yvir Havnina, og út á fjørðin.
Liggur innanfyri sethúsaøkið og A3-økið, til blandaða bústaða – og miðstaðarbygging hjá Havnar kommunu.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið**

**Tórshavn: Hús úti á Reyni, "Skipara Hansenshús"**



Skipara Hansens gøta 6
matr.nr. 118 og 119, grundøki 87 m².
Húsini eru søgulig, hin kendi Skipari Hansen átti og búði í húsinum.
Húsini er bygd saman við grannahúsunum, og er í tveimum hæddum.
Stovuhæddin 68 m², lág loftshædd uml. 50m².
Stovuhæddin: gong,wc/brúsa, køkur/stova í einum, skrivstova og eitt kamar.
Loftshæddin: hevur tveir kvistar, og innrættað til trý kømur.
Húsini hava nýggja flagtekju, sera hugnalig, hava gott pláss og í sera góðum standi (niðara hæddin grundumvæld síðst í 80'unum og ovara hæddin júst gjørd), út frá køkinum er hurð út í lítlan hugnaligan garð/terassu.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

**Argir: Tvíhús til sølu, Billugøtu 9**



matr.nr. 71a, grundøki 273 m².
Húsini, ið er bygd síðst í 50-árunum, er í trimum hæddum: kjallari, stovu- og loftshædd við trimpul, íalt uml.198 m²
Kjallarahæddin: gong, goymslurúm, fýr/vaskirúm.
Stovuhæddin: durur, gong, køkur,hjallur og stova.
Loftshæddini: gong, hjúnarúm, 3 kømur og baðirúm.
Út frá stovuhæddini er nýggj altan.
Aluminiumsklædning, vindeyguni eru skift og takið er nýtt. Stutt frá skúla og handli.
Sera gott útsýni yvir Sandagerð og inn á Havnarvág.
**Verða seld um nøktandi boð verður givið**

**Tórshavn: Sethús til sølu, Frúutrøð 16**



matr. nr.645u, grundøki 491 m²
Húsini eru í tveimum hæddum, hvør hæddin 116 m² .
Stovuhædd: Durur, gong, køkur, hjallur, stór stova, hjúnarúm, 2 kømur, wc og baðiverðilsi.
Kjallarahæddin: 2 kømur, vaskirúm, goymslurúm,wc + ein partur av kjallarinum sum hevur verið nýtt til vinnuligt endamál (djóralæknatænasta), er innrættaður við trimum rúmum við egnari inngongd.
Húsini bygd í 1965, stoypt grund og klødd við træ. Talan eru um eini stór hús við nógvum møguleikum, liggja sera væl fyri, friðaligt, miðskeiðis í býnum, hava gott útsýni og góðan garð við runnum, liggja lýtt og gott í mun til sólina.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**

Sosialurin 341800

**Runavík: Stór sethús til sølu.**



matr.nr. 91, grundøki 638 m².
Húsini, ið eru bygd í 1968, eru í 3 hæddum.
Stovuhædd uml. 152 m². Kjallarahædd uml. 52 m², +stórt loft við trimum kvistum til báðar síður.
Kjallarahæddin: gong, fýrrúm, kjallararúm/neyst.
Á stovuhæddini er durur, gong, wc, køkur,skrivstova, stova, 1 kamar, hjúnarúm, wc/bað beinleiðis frá hjúnarúminum.
Loftshæddin: gong, te-køkur, 5 kømur, goymslurúm og baðiverðilsi. Stórur hjallur er til húsið.
Húsini hava stóran urtagarð við runnum, liggja væl fyri, gott útsýni yvir á strandalandið, tætt við fjørðuna og havnalagið, vælegnaði til ferðavinnu.
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið**


## HÚS Í HAVN TIL SØLU

Húsini standa í Sigmundargøtu 12. Í húsunum er kjallari 40 m², miðhædd 54 m² og loft 54 m².

**Miðhædd:** Durur, køkur og stór stova.
**Loft:** Stór gongd, tvey kømur, goymslurúm/ lítið kamar og wc.
Kjallarin er ikki innrættaður

Húsini eru upprunaliga frá 1886, men eru umvæld øll sum tey eru frá 1997-2005.
Grundøkið er 173 m².

Boð undir 1,45 mio kr. ongan áhuga.

**Áhugað kunnu ringja 21 40 46**



HESTPRENT - TEL. 314 555

# Hús, hús, hús...

SETHÚSAMARKNAÐURIN